gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Ráðlegging og framtíðin

Tað er neyvan eindømi fyri Føroyar at settar verða ráð at koma við tilmælum um alskyns mál. Hetta er vanligt í øllum demokratiskum londum. Men nettupp tí ráðgevingin er so týdningarmikil sum grundleggjandi amboð hjá politikarunum, er tað altavgerandi, at fólkini, ið verða vald í nevndir, arbeiðsbólkar og ráð eru so politiskt óheft sum tað nú einaferð ber til.

Nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum ætlar at seta eitt Mentanarráð javnbjóðis við Búskaparráðið. Hetta verður tilmælt í Mentanarálitinum og er eftir okkara tykki sera skilagott. Landsstýrismaðurin sigur eisini, at hann ætlar eisini at seta fólk at gera tilmæli um mentanarpolitikk í sambandi við oljuvinnu. Eisini skilagott um hetta verður handfarið rætt.

Í hesum sambandi áttu føroyskir myndugleikar og politikarar við løgmanni á odda at tikið upp spurningin at sett eittt nýtt oljuráðleggingarráð, sum kundi havt somu funktión sum tann Oljuráðleggingarnevndin, sum so professionelt og skilagott ráðgav um alla oljutilgongdina fram til loyvisgeving. Sama nevnd gjørdi sær eisini tankar um tíðina eftir møgulig oljufund og er rætt at taka tær frágreiðingar fram aftur nú. Løgmaður nam í nýggjarsrøðu síni við týdningin at handfara hesa nýggju vinnu rætt. Tvs. at forða fyri teimum negativu avleiðingunum av henni. Tí kann eingin vera ósamdur við honum í.

Men kanska átti løgmaður nú, saman við øllum hinum landsstýrismonnunum – tí hetta er eitt mál, sum viðvíkur øllum økjum í samfelagnum – at tikið stig til at sett eitt nýtt oljuráðleggingarráð, sum skal hava til uppgáva at geva myndugleikunum ráð um, hvussu vit bera okkum skilabest at eftir møgulig oljufund. Td. at kunna ráðgeva í spurninginum um tað er rætt at fylgja lógarinnar teksti um, at øll olja skal í land í Føroyum, hvørjar avleiðingar hetta vil fáa bæði umhvørvisliga og sosialt osfr. Mong eru tey, sum siga seg bera ótta fyri nýggju vinnuni. Tað kann man ikki siga tey ring fyri. Tí tað ókenda ber oftani ótryggleika við sær. Men er viljin til steðar, so megna vit eisini hetta. Vit fara tí at ráða løgmanni til at taka hetta stig og skjóta upp, at hann heitir á fyrrverandi formannin í oljuráðleggingarnevndini, Árna Olafsson at átaka sær hesa uppgávu. Hann hevur arbeitt við hesum frá fyrsta degi, hevur tí neyðuga innlitið og haraftrat er hann professionellur og sakligur. Hóskandi kundi løgmaður kunngjørt hetta sama dag hann og oljuráðharrin – hvør veit – umborð á Sovereign Explorer ella West Navion – klippa snórin til fyrstu oljuboringina á landgrunninum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Paradís ella oyðimørk?



**Jóannes Jacobsen**

Ein partur av arbeiðnum hjá búskaparfrøðingum runt um í heimi er at greiða frá búskaparvøkstri, íløgum osfr., og um teir hava neyðugu tólini og tora væl, eisini at gera forsagnir um hesi fyribrigdi. Fyri at gera forsagnir um búskaparvøkstur og tílíkt nýta búskaparfrøðingar myndlar, har fyritreytir av ymsum slag eru lagdir inn. Fyritreytirnar eru av avgerandi týdningi fyri tey úrslit, ið koma út úr myndlinum, og mugu tí vera væl grundaðar í búskaparfrøðini.

Út frá myndlinum kunnu forsagnir um fyribrigdi av áhuga so gerast. Kjakið millum búskaparfrøðingar stendur so um, hvørt fyritreytirnar, sum eru lagdir inn í ein ávísan myndil, eru rímiligar ella ikki. Útrokningar um til dømis alment yvirskot ella undirskot í einum rokniarki, tá tølini fyri bruttotjóðarúrtøku osfr. eru komin úr myndlinum, eru venjingar í pluss og minus og kunnu latast upp í hendurnar á studentaskúlanæmingum.

Ì sambandi við ætlanirnar at minka ríkisstuðulin eru nakrir "búskaparfrøðingar" komnir við forsagnum um avleiðingarnar, um tær verða gjøgnumførdar. Men trupulleikin er, at "búskaparfrøðingarnir" hava ikki gjørt forsagnir um búskaparvøkstur osfr. út frá búskaparfrøði. Teir hava ikki bygt ein myndil til at gera forsagnir, soleiðis at búskaparfrøðingar kunnu kjakast um fyritreytirnar. Í staðin hava teir lopið búskaparfrøðisliga partin um og lagt fyritreytirnir beinleiðis á tað, sum teir skulu gera forsagnir um. Tað vil siga, at teir seta sum fyritreytir tað, sum teir skulu forklára, og tað hevur einki við búskaparfrøði at gera. Alt eftir lyndi og politiskari sannføring seta teir sum fyritreyt, at gongdin verður upp ella niður, og gera so "træk og slip" venjingar í einum rokniarki um yvirskot ella undirskot hjá tí almenna.

Av tí at teir hava lopið búskaparfrøðisliga partin um, er ógjørligt at hava eitt fakligt kjak um tølini, tí ein og hvør kann koma við sínum persónligu forsagnum, ella í hesum føri fyritreytum, um, hvat búskaparvøksturin, íløguvøksturin osfr. fara at vera næstu 10 ella 15 árini. So leingi fyritreytirnar ella forsagnirnar ikki eru grundaðar á ein vælformuleraðan búskaparmyndil, eru tær bara persónligar "fingurin út gjøgnum vindeyga" metingar.

Onkur vil kanska siga at hetta er betur enn einki, tí tey halda, at vit mugu hava at vita, hvat fer at henda. Men í hesum førinum eru framskrivingarnar verri enn einki, tí tær geva borgaranum eina fatan av, at tað finnast kvalifiserað boð upp á, hvussu nógv búskapurin fer at broytast, um ríkisstuðulin verður minkaður burtur yvir eitt ella annað áramál. Veruleikin er, at vit hava onga hóming av tí. Við støði í búskaparfrøðini kunnu vit koma við kvalifiseraðum boðum upp á kvalitativar broytingar sum fylgja av minkingini í blokkinum, tað vil siga at vit kunnu siga at "hatta fer upp" og "hatta fer niður". Men vit hava ongan møguleika at seta tøl á broytingarnar.

Í øðrum londum hava búskaparfrøðingar í nógv ár arbeitt við at gera teldumyndlar, sum kunnu seta tøl á tær kvalitativu útsagnirnar búskaparfrøðin kemur við um langtíðarárin av búskaparligum broytingum. Stór framstig eru gjørd, men enn er langt eftir á mál. Í Føroyum eru vit ikki byrjað. Vit hava bert myndilin, sum var nýttur í samband við arbeiðið at gera Hvítubók. Hesin myndilin kann møguliga nýtast til at gera nøkulunda brúkiligar forsagnir um avleiðingar av smáum broytingum 1 til 2 ár fram í tíðina. Í hvussu so er kann búskaparfrøðisligt kjak verða um fyritreytirnar í myndlinum. Men hann kann als ikki klára so umfatandi broytingar, sum tær vit tosa um í sambandi við burturtøku av ríkisstuðulinum.

Gongdina í føroyska búskapinum tey næstu 10 til 15 árini, við ella uttan ríkisstuðuli, vita vit sera lítið um, og tað mugu vit læra okkum at liva við – fyribils í hvussu so er. At "búskaparfrøðingar" útgeva sínar persónligu meiningar undir heiti av búskaparfrøði, tá búskaparfrøði ongantíð hevur verið inni í myndini, bøtir ikki um støðuna, heldur tvørturímóti.

# Til Bjarna Djurholm, Ferðslumálaráðharra

**Svenning Borg**
*Vágur*

Hervið vil eg heita á ferðslumálaráðharran, um at lata vera við at yvirtaka Vága floghavn og ístaðin at brúka pengarnar til vegakervið í Suðuroynni, har gera pengarnir meira nyttu.

Suðuroyggin er heilt afturúrsigld, tá ið tað kemur til vegirnar í oynni og mátti tað verið ein stór skomm fyri einahvørja sitandi samgongu at bjoða einum parti av sínum borgarum so vánaligar vegir sum teir, ið okur hava.

Berghol millum Hov-Øravík og Øravík-Fámjin og vegirnar á sama støði sum í hinum størru oyggjunum er ikki ov nógv kravt, landskassin hevur flotið yvir í pengum nú í fleiri ár, men ikki sæst hettar aftur í Suðuroynni, jú kanska eitt sindur, herfyri koyrdi jú landsverkfrøðingurin asfalt í holurnar á vegnum út á Akrar, eftir at teir stóru bilarnir noktaðu at koyra meira eftir hesum vánaliga vegi.

Minsta krav er at landsvegirnir eru tryggir at ferðast eftir, tað eru teir so slettis ikki hjá okum.

**PRENT?**
…nýggjasta tøknin og gott handverk geva besta úrslitið…
Spf.
**HESTPRENT**
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

**Sosialurin**
**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Flogfar sendi neyðarkall

**Sunnudagin stóð alt bjargingarliðið í Vágunum tilbúgvið, tí eitt flogfar hevði boðað torninum frá, at trupulleikar vóru við motorinum. Flogfarið lendi tó í øllum góðum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin umleið klokkan hálvgum seks fekk tornið á flogvøllinum í Vágunum neyðarkall frá einum flogfari, sum var einar 50 fjórðingar sunnanfyri Føroyar.

Talan var um eitt lítið flogfar av slagnum Mooni M20 við tveimum fólkum umborð. Flogfarið var á veg av Wick flogvøllinum í Skotlandi til Reykjavíkar, haðani tað skuldu víðari til Amerika.

Tá flogfarið er tjúgu minuttir úr Føroyum varnast tey, at motorurin ikki gongur, sum hann skal. Tey senda tí boð til Vágarnar og boða frá, at trupulleikar eru við motorinum.

Boð vórðu send til sløkkiliðið, løgregluna og nýggja tyrlan hjá Atlantsflogi stóð eisini tilbúgvin. Flogfarið lendi tó í øllum góðum, og tornið hevði allatíðina samband við flogfarið. Úr Vágunum verður sagt, at arbeiðið við tilbúgvingini eydnaðist avbera væl.

Tvey miðaldrandi fólk vóru umborð. Ein kvinna úr Australia og ein maður úr USA. Tey fóru avstað aftur mánadagin klokkan 11 eftir at hava gist á Hotel Vágum eina nátt.

Hildið verður, at vatn í brennievninum er orsøkin til motortrupulleikarnar. Tá flogfarið fór niðureftir, gekk motorurin betur, og tey kundu lenda.

# Maskinmeistararnir á Teistanum klárir

Nú er ein av forðingunum, sum hevur gjørt, at nýggja Standoyarferjan ikki sleppur í sigling, beind av vegnum.

Tað hendi, tá ið Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið leygarkvøldið gjørdu semju um nýggja strandfaraskipið Teistan.

Partarnir eru samdir um at Tiestin kemur í sama bólk sum Dúgvan og Ternan.

Men harumframt fáa maskinmeistarnir fáa eina viðbót upp á 300 krónur um mánaðin.

Somuleiðis hava partarnir avtalað, at tá ið næstu ferð, sáttmálasamráðingar verða, skulu broytingar gerast í øðrum lønarflokkum.

Nú er so eftir at gera greiða ósemjuna við Skipara- og Navigatørfelagið. Ikki, fyrrenn tann ósemjan er greitt, sleppur Teistin í sigling.

# Mentanarkvøld og politikkur

**Um vikuskiftið skipaði Javnaðarflokkurin fyri summarstevnu á Svangaskarði. Á skránni var m. a. mentanarkvøld, útferð og fólkafundur við Toftavatn**

SUMMARSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*



*Eftir útferð á Eystnes og ábit í Æðuvík var fólkafundur hilidn við Toftavatn leygardagin. Røðarar vóru Jóannes Eidesgaard, Niclas Mikkelsen í Gøtu og Jancy Olsen á Toftum*

Um vikuskiftið hittust javnaðarfólk til stevnu á Svangaskarði á Toftum. Hetta er fimta árið á rað, at Javnaðarflokkurin skipar fyri summarstevnu.

Hans Jørgensen, skrivari hjá Javnaðarflokkinum, sigur, at árliga summarstevnan nú er fastur táttur í teimum tiltøkum, sum flokkurin skipar fyri til tess at fáa betri samband við fólkið.

Summarstevnan byrjaði fríggjakvøldið, tá skipað varð fyri einum mentanarkvøldi á Svangaskarði. Har var tónleikur við eitt nú Eivør Pálsdóttir og Leirvíkar Gentukóri undir leiðslu av Dánjali Eysturstein. Genturnar úr Leirvík sungu úr skránni, tær hava gjørt til eina Noregsferð, tær skulu á í summar. Afturat hesum framførdu eisini fýra ung úr Fuglafirði klarinetttónleik.

– Umframt tónleikin hevði Petur Eli Mikkelsen, fyrrverandi lærari úr Gøtu, hugleiðingar um eitt nú barnaárini í Gøtu og um menningina hjá føroyska skúlanum seinasta mannaminnið. Petur Eli er frágera góður frásøgumaður, so hetta var rættuliga hugtakandi, sigur Hans Jørgensen

Leygarmorgunin hittust fólk aftur til morgundrekka á Svangaskarði, áðrenn farið varð til gongu út á Eystnes við Sigfred Johannesen sum ferðaleiðara.

– Hetta var ein góður túrur, sum var lættur at ganga, sigur Hans Jørgensen. Vit vóru burturi í einar tveir tímar, og aftaná fóru vit oman til Æðuvíkar, har ein máltíð var at fáa á støðni, sigur hann.

Klokkan 18 leygarkvøldið var skipað fyri fólkafundi við Toftavatn, har Jóannes Eidesgaard, Niclas Mikkelsen í Gøtu og Jancy Olsen á Toftum hildu røðu.

Um kvøldið var veitsla á Svangaskarði, har Robin og Valter undirhildu, føroyskur dansur var, og Mourits og Njál spældu til dans til tann ljósa morgun.

Hetta er fimta ferðin, at Javnaðarflokkurin skipar fyri summarstevnu. Hans Jørgensen sigur, at næstu ferð ætla tey at hava stevnuna fyrr um várið, tí tað er so nógv, sum fellur saman, tá komið er út í junimánað. Hvussu verður næsta ár dugir hann tó ikki at siga, tí tað veldst um, nær løgtingsvalið verður – og tað verður í seinasta lagi 30. apríl, so tað kann vera, at onkur stevna verður í tí sambandinum.

Fyrsta summarstevnan av hesum slag varð hildin á Sandi í 1997. Tann næsta var á Tvøroyri í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðani Petur Mohr Dam varð føddur, tann triðja í Vágum í 1999. Í fjør var stevnan í Norðoyggju m. a. við útferð í Kalsoynni.

# Nógvir førarar tiknir

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Seinastu vikuna hevur løgreglan í Eysturoynni tikið heili 12 førarar, sum kunnu vænta sær treytaða frádøming av koyrikortinum, t.v.s. at teir skulu upp til nýggja koyriroynd. Sjey av hesum vórðu tiknir um vikuskiftið undir Eystanstevnuni, meðan hinir fimm eru tiknir gjøgnum vikuna.

Harumframt hevur løgreglan í farnu viku givið 40 øðrum førarum bót fyri at hava fótin ov tungan á spitaranum.

Løgreglan í Runavík sigur, at ógvuliga nógv koyring hevur verið í sambandi við stevnuna, og tí hava tey tikið so nógvar førarar fyri at koyra ov skjótt.

Sunnukvøldið tók løgreglan enn ein førara fyri at koyra við kenning.

# Sligin í høvdið við fløsku

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið vórðu tvey mál um harðskap fráboðað løgregluni í Runavík. Bæði málini fóru fram í ítróttarhøllini í Runavík, har dansur var í sambandi við Eystanstevnuna.

Ein maður varð sligin í høvdið við eini fløsku og fekk tí skaða í høvdið. Annar maður varð sligin niður og breyt eina tonn. Løgreglan kannar bæði málini í løtuni.

Annars hevði løgreglufólkið nógv meira um at vera um vikuskiftið enn vant vegna Eystanstevnuna.